# TILTØK

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti. Í morgin kl. 17 Landsbøn. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Evnið: Endurføðingin – at verða Guds barn. Talari: Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evnið: Jesus er tann besti. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Hebron, Argir**
Leygarkvøldið kl. 19 verður nýggjársveitsla.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum talar Karl Johan Nielsen av Vatnsoyrum. Eingin sunnudagsskúli verður kl. 12, men kl. 15 verður nýggjársveitsla fyri børnum. www.hebron.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgunin kl. 7 Bønarmøti.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta**
Sunnudagin kl. 17 Ársveitsla fyri soldátum – tilhoyrandi og vinum (tilmeldan).
Mánadagin kl. 17 og 19 skótamøtir.

**Meinigheitshúsið**
Heimsbønarvika er hesa vikuna, og er møti hvørt kvøld má.-leygardag kl. 20.
Leygardagin kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 endar heimsbønarvikan við møti v/ Ejvind Mouritsen.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20-22 byrjar JC-Teens aftur.
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt (fyri m.a. valinum).
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Havnar kirkja**
Várkonfirmatiónirnar 2004 verða 21. mars, 28. mars og 4. apríl. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar kirkju mikudagin 14. januar kl. 15. Markið millum eystaru og vestaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

**Vesturkirkjan og Argja kirkja**
Várkonfirmatiónirnar 2004 verða í Vesturkirkjuni 28. mars og 4. apríl og í Argja kirkju 4. apríl.
Konfirmantarnir skulu møta í Vesturkirkjuni mikudagin 14. januar kl. 15. Markið millum vestaru og eystaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 er evnið »Familjan og hugni«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariassen um »Tær sjey samkomurnar í Opinberingini – Laodikea«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 (í eini skúlastovu) Bíbliutími har Jógvan Z. undirvísir um Opinberingina. www.livdin.fo

**Aglow-Føroyar**
Skeið við Birgit Tind frá Apostolsk Højskole í Kolding verður í Evangeliihúsinum í Havn fyri allar Aglow-áhugaðar kvinnur 13.-14. februar 2004. Tilmelding á tlf. 447825 ella 217825 innan 3. feb.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin kl. 20 Taizekvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 hámessa v/ Lars Messerschmidt, prestur í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, onki møti vegna fráferðarsamkomu fyri Jórun og Nurlan Malaikev í missiónshúsinum í Hvalvík kl. 18. Missiónsvikan byrjar týsdagin 13. januar, har Mogens Tilsted Christensen talar og sangbólkurin Gittit syngur.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting kl. 11 við Eiler Johannesen. Eisini verður innsetan av fyristøðuparið.
Týskvøldið verður bønarmøti við Fríðbjørn Poulsen.

**Meinigheitshúsið, Sandavágur**
Familjugudstænasta verður í kirkjuni kl. 15, ístaðin fyri sunnudagsskúla. Inga Dam, Barnakórið og Ungdómskórið úr Vágum luttaka. Møti verður í Meinigheitshúsinum kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomn til tiltøkini.

**Aglow-Føroyar**
Vikuskifti fyri menn í Libanon í Sørvági 23.-25. apríl 2004. Talari verður Børge Porsen, Kolding. Tilm. á tlf. 447825 ella 217825 v/ Rannvá Royðutoft innan 1. apríl 04.

**Skúlin í Skálafirði**
Missiónsvikan er í døgunum frá 7.-11. januar.
Fríggjadagin kl. 20 Teir 4 úr Havn hava kvøldið.
Leygardagin kl. 20 tala og syngja Jónhilda og Gulak. (Innsavnan til Heimamissiónina).
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 talar Niels Jacob Nielsen og Jónhilda og Gulak syngja.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Nerija, Skála**
Nýggjársveitsla verður sunnudagin kl. 16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Tim 5 verður mánadagin kl. 17.30 og ungdómsmøti kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Gøtu**
Leygarkvøldið 10. januar kl. 20 Ungdómsmøti í kirkjukjallaranum við Jóhannus Mikkelsen av Skála.
Sunnukvøldið kl. 18 Sjómans- og nýggjársveitsla í kirkjukjallaranum, har Jógvan Fríðriksson, prestur, hugleiðir. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Í sambandi við alheims bønarvikuna verður bønarmøti hvørt kvøld hesa vikuna kl. 19.30.

**Aglow-møti**
verður í Hæddini í Runavík leygardagin 10. januar kl. 15. Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

**KFUM & K, Klaksvík**
Hósdagin kl. 20.30 Gospelkórið »Gleði venur«.
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Øssur Kjølbro, evnið: **Altarborðið. Eisini verður kunnað um túrin til Ísraels á páskum**.
Kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Jólafest fyri vaksin. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Missiónsvikan verður í døgunum 25.-29. februar.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Rósing Lydersen, kl. 18 Evangel. møti. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Birgit Nielsen, Jeannu Viderø og Myrku Hauritz. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður í húsinum hjá Matmøðrafelagnum í Vági leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eddie Bech talar.
Týsdagin kl. 20 Heimaforbundið.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.**

**Frá Randers**
Føroyskt møti verður í »Saron«, Steen Blichers Gade 1C, sunnudagin 11. jan. kl. 15 við Hera Elttør, túboðara. Aftaná verður hugnalig samvera við kaffi o.ø. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Trettandahald í Ballerup**
Leygardagin 10. januar kl. 19.30 halda vit trettanda við føroyskum dansi og einum góðum bita í sethúsunum á Ryttergården í Pederstrup.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 5. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur
kl. 10.30-18 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
***Týsdagur 6. januar***
kl. 10-11.30 Sangur. Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14.30 Jukim Olsen sigur frá
***Mikudagur 7. januar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestur. Tilmelding mánadag tlf. 316491
kl. 15 Túrur
kl. 15-21 Opið hús
***Hósdagur 8. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
**Fríggjadagur 9. januar**
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestur. Tilmeld. mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Frá Eldrafelagnum Nón Saltangará**
Vit koma saman í Hæddini týskvøldið kl. 19.30 til Hugnaløtu og burturluting. Nýggir limir eru vælkomnir við.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Fríggjadagur 9. januar***
Opið hús.
Kaffi/te og pannukøkur.

*Gjørt verður vart við, at væl ber til at nýta Eysturoyarleiðina til Fløvan. Um spurningar eru, eru tit vælkomin at ringja 448051.*


BESTSELLERANALYSA2003
- Donsk analysa av 20 teim populerastu sniðunum, eftir 4 árs ognartíð og 80.000 km. koyring




HyundaiGetz inn sum Nr 1

HONDA NORÐBIL ŠKODA Volkswagen Group HYUNDAI

BOX 1070 · OYGGJARVEGUR · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 313707 · FAX 310855

Sosialurin 341800




## FILMSTEIGURIN

# S.W.A.T. – Serdeildin í L.A.

Heitið á filminum er stytting fyri serdeildina hjá løgregluni í Los Angeles, Special Weapons And Tactics Team. Hetta eru harðastu hálsanir innan løgregluna í statinum, og kunnu einamest sammetast við froskmannaliðið hjá herinum. Teir eru servandir í at nýta mest framkomnu vápnini og djarvastu framferðarhættirnar í sínum arbeiði, sum fyrst og fremst fevnir um at niðurberja øll sløg av kriminaliteti.





Samuel L. Jackson og Colin Farrell hava í hesum filminum leiklturi sum tveir S.W.A.T. limir, og saman við starvsfeløgunum fáa teir sítt at takast við, tá teir skulu verja ein stórbrotsmann, sum nú er handtikin. Brotsmaðurin hevur nevnliga boðað frá, at tann ella tey, sum megna at hjálpa honum út úr fongslinum, fáa ikki færri enn 100.000.000$. Leikstjórnað filminum hevur Clark Johnson, og umframt teir báðar omanfyri nevndu, eru eitt nú Michelle Rodriguez, LL Cool J og Brian Von Holt. Alt leikarar, sum ikki eru bangnir fyri eitt sindur av action, og tað er eisini hetta, sum fólk kunnu vænta sær.




Fríggjadagin 09.01. kl. $20^{45}$
Leygardagin 10.01. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 11.01. kl. $20^{45}$

Fríggjadagin 09.01. kl. $23^{45}$
Leygardagin 10.01. kl. $23^{45}$
Sunnudagin 11.01. kl. $22^{15}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo

START ÅRET MED EN MEGA GRINER




Fríggjadagin 09.01. kl. $21^{45}$
Leygardagin 10.01. kl. $21^{45}$
Sunnudagin 11.01. kl. $18^{45}$

Fríggjadagin 09.01. kl. $23^{15}$
Leygardagin 10.01. kl. $23^{15}$




Fríggjadagin 09.01. kl. $17^{30}$
Sunnudagin 11.01. kl. $18^{00}$
Leygardagin 10.01. kl. $17^{30}$




Fríggjadagin 09.01. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 11.01. kl. $23^{15}$
Leygardagin 10.01. kl. $18^{00}$

**P BIO KIOSKIN P**
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.